# Eldraráð skal skipast í Havn

**– Tórshavnar kommuna eigur at fáa eldraráð, sum fer at virka frá 1. januar 2006! So greið er niðurstøðan hjá einum arbeiðsbólki, sum seinastu mánaðirnar hevur arbeitt við at gera álit um Eldraráð í kommununi.**

ELDRAPOLITIKKUR
*Snorri Brend*


*Heðin Mortensen fær handað álitið um eitt eldraráð í Havn frá Fridu Hansen. - Nú er nokk tosað. Nú skal arbeiðast!*

*Mynd: Bárður Lydersen*

Arbeiðsbólkurin hevur kunnað seg um, hvussu arbeiðið við eldraráðum í hinum norðanlondunum og Hetlandi er lagt til rættis.

Bólkurin hevur arbeitt við at finna besta leistin at skipa ráðið, og hvørjar treytir eiga at vera at tryggja góðan demokratiskan valsið. Úrslitið er eitt álit, sum var handað borgarstjóranum í morgun.

Álitið verður nú sent til politiska viðgerð, áðrenn endalig avgerð verður tikin helst áðrenn summarfrítíðina í ár.

Arbeiðsbólkurin var settur eftir áheitan frá Tórshavnar kommunu. Í bólkinum sótu tvey umboð fyri Pensionistafelagið í Havn, Karin Jacobsen og Erling Poulsen, tvey umboð fyri Tilhaldið, Jákup Lindenskov og Frida Hansen, og eitt umboð fyri dagtilhaldið í Kollafirði, Poula Christiansen.

Tórshavnar kommuna metir, at ein so stór kommuna eigur at hava eldraráð. Við miðvísum samskifti og samstarvi við tey eldru, kann kommunan náa mál, sum í longdini fara at roynast munagóð.

Tað er umráðandi fyri politikaran at vita, hvat veruliga ger mun í gerandisdegnum og ikki minst, at tey eldru kenna, hóast eldri og pensionistur, so er teirra tilfeingi eins neyðugt og virðismikið fyri heildina sum hjá teimun yngru.

### Álitið

Í einum seinni blaði fara vit at hyggja nærri eftir álitinum um Eldraráð.

# Øll hava fartelefon í 5. flokki



**Kanning í Nonnuskúlanum vísir, at í 5. og 7. flokki hava allir næmingarnir fartelefon. Loyvt er kortini ikki at brúka hesar í skúlatíðini.**

FARTELEFONI
*Snorri Brend*

**Havn:** 45 fartelefonir til 45 næmingar.

Soleiðis er støðan í 5. flokkunum í Nonnuskúlanum í Havn. Og í 7. flokkunum er sama støðan, tí har hava 47 av íalt 47 næmingum fartelefon.

Hetta vísir ein kanning, sum 6. A flokkur í sama skúla hevur gjørt, og sum er kunngjørd í blaðnum, tey hava givið út og sum kallast "Minutt og sekund".

Fyri mong er hetta úrslitið neyvan skakandi, men tað er altíð áhugavert at fáa staðfest ein varhuga við tølum.

Tað ger henda kanningin hjá flokkinum so sanniliga. Hinvegin so er ikki loyvt at brúka fartelefonir í skúlatíðini í Nonnuskúlanum.

### Øll

Í blaðnum leygardagin nevndu vit um arbeiðið hjá 6. A flokki at geva út hetta blaðið.

Blaðið hevur ein hóp av áhugaverdum greinum um ymisk evni, m.a. um nýtsluna av fartelefonum í skúlanum.

Næmingarnir hava spurt íalt 307 næmingar úr 1. til 7. flokki, og av hesum høvdu altso 235 teirra fartelefon.

Fægstar telefonir eru – sum vituligt er – í 1. flokki, har einans 26 % av næmingunum hava fartelefon.

Men so hvørt sum børnini gerast eldri, økist talið av fartelefonum samsvarandi, um ein sær burtur frá næmingunum í 5. flokki, har altso allir næmingarnir hava hvør sína fartelefon.

### Ikki loyvt

Eitt er so talið av fartelefonum. Annað er so hvat ein sigur frá skúlanum til henda veruleika.

Blaðið "Minutt til sekund" hevur tosað við ein av lærarunum í skúlanum, Torkil Dahl, sum sigur, at tað ávirkar seg at næmingarnir hava fartelefon í tímanum.

Hinvegin so vísir hann á, at næmingarnir sleppa ikki at brúka fartelefonina í fríkorterinum. Orsøkin er hin einfalda, at skúlin snøgt sagt hevur bannað allari nýtslu av fartelefonum í skúlatíðini.

Torkil Dahl sigur við blaðið, at hann sjálvur ongatíð hevur tikið nakra telefon frá nøkrum næmingi, hóast hann eisini kann staðfesta, at næstan allir næmingarnir hava eina slíka.

### Fartelefonir í Nunnuskúlanum

Kanning hjá 6. A flokki kom til fylgjandi úrslit um talið av fartelefonum í Nonnuskúlanum.

| Flokkur | Tal av næmingum | Fartelefonir | % |
|---|---|---|---|
| 1. | 42 | 11 | 26,19 |
| 2. | 45 | 22 | 48,8 |
| 3. | 38 | 30 | 78,95 |
| 4. | 46 | 37 | 80,43 |
| 5. | 45 | 45 | 100 |
| 6. | 44 | 43 | 97,72 |
| 7. | 47 | 47 | 100 |